# Smábátar
# tryggingartreytir

TRYGD

nr. 75.03
Januar 2017

www.trygd.fo

# Innihaldsyvirlit


| 1. | Alment | Síða |
|---|---|---|
| 1.1 | Lóggáva o.a | 4 |
| 1.2 | Stovnan av tryggingini | 4 |
| 1.3 | Hvør er tryggjaður? | 4 |
| 1.3.2 | Nýggjur eigari | 4 |
| 1.4 | Siglingarleið | 4 |

| 2. | Hvat fevnir tryggingin um? | Síða |
|---|---|---|
| 2.1 | Skrokktrygging | 4 |
| 2.1.3 | Sjóskaði | 4 |
| 2.1.4 | Eldur, spreinging og toruniðursláttur | 4 |
| 2.1.5 | Stuldur, herverk og rán | 4 |
| 2.1.6 | Aðrar skaðaorsøkir | 4 |
| 2.1.7 | Skaði á maskinu, leysamotorar, uttanborðadrev og spøl | 5 |
| 2.1.8 | Skaði á búnaðarlutir | 5 |
| 2.1.9 | Tryggingin fevnir ikki um | 5 |
| 2.1.13 | Grindaskaðar | 6 |
| 2.2 | Skaðauppgerð | 6 |
| 2.2.2 | Partvísir skrokkskaðar | 6 |
| 2.2.3 | Totalskaði | 6 |
| 2.3 | Ábyrgdartrygging | 6 |
| 2.3.2 | Hvat fevnir ábyrgdartryggingin ikki um? | 6 |
| 2.3.4 | Endurgjaldsupphæddir fyri ábyrgdartryggingina | 6 |
| 2.4 | Hvussu verður endurgjald fyri skrokkskaðar latið? | 7 |
| 2.4.2 | Umvæling | 7 |
| 2.4.3 | Nývirðisendurgjald | 7 |
| 2.4.4 | Kontant endurgjald | 7 |
| 2.4.5 | Endurgjald fyri radiotól og nautisk tól | 7 |
| 2.4.6 | Endurgjald fyri gear/drev á maskinu | 7 |

| 3. | Felagsreglur | Síða |
|---|---|---|
| 3.1 | Tá trygging verður teknað | 7 |
| 3.2 | Iðranarrættur | 8 |
| 3.3 | Tryggingarskeið, uppsøgn og broyting | 8 |
| 3.4 | Rindan av tryggingargjaldi | 8 |
| 3.5 | Prístalsviðgerð | 8 |
| 3.6 | Flyting, navna- og váðabroyting | 8 |
| 3.7 | Sjálvsábyrgd | 8 |
| 3.8 | Dupulttrygging | 8 |
| 3.9 | Eftirlit við bátinum | 8 |
| 3.10 | Bjarging og varðveitsla | 9 |
| 3.11 | Burturbeining av skaddum lutum | 9 |
| 3.12 | Viðlíkahald o.a | 9 |
| 3.13 | Skaði elvdur við vilja ella av ósketni v.m | 9 |
| 3.13.1 | Við vilja | 9 |
| 3.13.2 | Við grovum ósketni | 9 |
| 3.13.3 | Undir ávirkan av rúsandi løgi ella evni | 9 |
| 3.13.4 | Tá tryggjaði er undir 14 ár | 9 |
| 3.14 | Trygdarásetingar | 9 |
| 3.15 | Kærumøguleikar | 9 |
| 3.16 | Rættargongd | 9 |

| 4. | Skaðafráboðan v.m. | Síða |
|---|---|---|
| 4.1 | Tá skaði hendir | 9 |
| 4.2 | Skaðafráboðan | 9 |
| 4.3 | Umvæling | 10 |
| 4.4 | Ábyrgdarskaðar | 10 |
| 4.5 | Skjalprógv | 10 |

| 5. | Serstakar tryggingar | Síða |
|---|---|---|
| 5.1 | Sálarlig kreppuhjálp | 10 |
| 5.2 | Persónligir ognarlutir | 10 |

| 6. | Ískoytistryggingar | Síða |
|---|---|---|
| | *Er bert umfatað av tryggingini, um tað er tilskilað á tryggingarskjalinum* | |
| 6.1 | Snellur | 10 |
| 6.2 | Maskintrygging | 10 |

## 1. Alment

### 1.1 Lóggáva o.a.

1.1.1 Tryggingin veitir endurgjald eftir reglunum í Sjótryggingarsáttmálanum frá 2. apríl 1934, við møguligum seinni broytingum, og teimum útgreiningum, broytingum og uppískoytum, sum standa í niðanfyri tilskilaðu tryggingartreytum og møguligum sertreytum í tryggingarskjalinum.

1.1.2 Tryggingin umfatar bátar og før upp til 20 BRT.

### 1.2 Stovnan av tryggingini

1.2.1 Tryggingin tekur við í teirri løtu, felagið góðkennir áheitan um trygging ella frá teirri løtu semja er um tryggingaravtaluna.

1.2.2 Tekur tryggingin við í staðin fyri trygging í øðrum tryggingarfelag, tekur tryggingin við frá teirri løtu, tryggingin í hinum tryggingarfelagnum heldur uppat.

### 1.3 Hvør er tryggjaður?

1.3.1 Tryggingartakarin og ein og hvør, sum við loyvi frá tryggingartakaranum brúkar bátin, eru fevnd av tryggingini.

1.3.2 Nýggjur eigari er fevndur av tryggingini í 3 vikur aftan á eigaraskifti, tó í mesta lagi til nýggj bátatrygging er teknað.

### 1.4 Siglingarleið

1.4.1 Siglingarleið er Føroyar. Siglingarleiðin samsvarar við treytirnar frá myndugleikunum um føroyskt sjómark. Sí tó grein 1.4.3.

1.4.2 Møguleiki er at víðka siglingarleiðina, um báturin lýkur treytirnar fyri hesum.

1.4.3 Báturin kann verða staddur uttanfyri Føroyar (tó bert í Norðurlondum og Stóra Bretlandi) í upp til 60 dagar, uttan at tað ávirkar tryggingina. Longri tíðarskeið skulu fráboðast Trygd, sum tekur støðu til um, og undir hvørjum treytum, tryggingin kann halda fram.

## 2. Hvat fevnir tryggingin um?

### 2.1 Skrokktrygging

2.1.1 Tryggingin fevnir um skaða á sjálvan skrokkin á bátinum, búnaðarlutir, føst fiskiamboð (tó undantikið snellur), tiltaksamboð, ravmagnsútbúnað, nautisk tól og lívbátar.

2.1.1.1 Omanfyri nevndu lutir, ið hoyra til bátin, men sum fyribils (upp til 6 mánaðir) eru tiknir úr bátinum, eru somuleiðis tryggjaðir. Endurgjaldið fyri hesar lutir kann í mesta lagi verða 10% av tryggingarupphæddini fyri bátin.

2.1.2 Tryggingin veitir endurgjald fyri skaða á skrokkin, sí grein 2.1.1, sum er ein beinleiðis fylgja av:

1. Sjóskaða, sí grein 2.1.3.
2. Eldi, spreinging og toruniðursláttri, sí grein 2.1.4.
3. Stuldri, herverki og ráni, sí grein 2.1.5.

### 2.1.3 Sjóskaði

2.1.3.1 Sjóskaði er uttanífrá komandi skaði, ið brádliga hendir á skrokkin, sí grein 2.1.1, meðan báturin er á sjónum, orsakað av eini uttanífrá, tilvildarligari og óvæntaðari hending.

2.1.3.2 Umframt hetta fevnir tryggingin um skaða orsakað av at báturin søkkur, hvølvur, er strandaður, hevur rent á grunn ella stoytt saman við øðrum báti, flótandi luti ella ísi.

### 2.1.4 Eldur, spreinging og toruniðursláttur

2.1.4.1 Tryggingin fevnir um skaða orsakað av eldi, spreinging og tá toran slær niður.

2.1.4.2 Við eld er at skilja opin, logandi, ótamdur eldur.

2.1.4.3 Við spreinging er at skilja ein evnafrøðigerð, ið varir stutt og ger sterkan hita, eins og evni í andgerð økjast ógvusliga í rúmd.

2.1.4.4 Toran hevur sligið niður, tá tað ber til at ávísa skaða á skrokkin, ið er beinleiðis fylgja av torusláttri.

### 2.1.5 Stuldur, herverk og rán

2.1.5.1 Tryggingin fevnir um skaða av herverki. Við herverk er at skilja skaði voldur við vilja og av illum huga av fólki, ið ikki hava lógliga atgongd til bátin.

2.1.5.2 Harumframt fevnir tryggingin um stuldur av bátinum og stuldri frá bátinum, tá hesin var forsvarliga læstur.

2.1.5.2.1 Tað verður ikki mett sum forsvarliga læst, at lutirnir eru innilokaðir av presending ella kalesju.

2.1.5.3 Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at tað síggjast spor eftir, at stuldurin er farin fram við at nýta amboð og/ella vald.

2.1.5.4 Við rán er at skilja:

1. Stuldur av lutum farin fram undir nýtslu av ella undir hóttan um at nýta vald við tað sama.
2. Stuldur av lutum í nánd av tryggjaða uttan nýtslu av valdi, um tryggjað ella onkur annar hevur varnast stuldurin í somu løtu, hendingin fer fram. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at viðkomandi rópar varskó, ella at stuldurin kann váttast av onkrum øðrum hjástaddum.

2.1.5.5 Skaðar av stuldri, herverki og ráni skulu verða fráboðaðir løgregluni á staðnum, og kvittan fyri fráboðanina send Trygd, áðrenn endalig støða verður tikin til skaðan.

2.1.5.6 Hendir skaðin uttanlanda, skal skaðin, umframt at verða fráboðaður løgregluni á staðnum, eisini fráboðast løgregluni í Føroyum.

### 2.1.6 Aðrar skaðaorsøkir

2.1.6.1 Umframt omanfyri nevndu skaðaorsøkir fevnir tryggingin somuleiðis um brádligan skaða á skrokkin, sí grein 2.1.1, orsakað av eini brádligari, tilvildarligari og óvæntaðari hending, tá báturin:

1. Verður tikin upp
2. Verður flotaður
3. Stendur uppi á landi
4. Verður fluttur innanoyggja

**2.1.7 Skaði á maskinu, leysamotorar, uttanborðadrev og spøl**

2.1.7.1 Tryggingin fevnir um skaða á omanfyri nevndu lutir, sum er ein beinleiðis fylgja av:

1. Eldi v.m. sí grein 2.1.4, í øðrum enn maskinuni.
2. At báturin er sokkin vegna skaðahending, sum annars verður goldin sambært tryggingartreytunum, hvølvdur, strandaður ella rent á grunn.
3. At báturin hevur rent á fastan ella flótandi lut, íroknað ís.
4. Stuldri, herverki og ráni, sum ikki er framt av manning ella ferðafólki.
5. Sjóskaða, sí grein 2.1.3.

**2.1.8 Skaði á búnaðarlutir**

2.1.8.1 Skaði á segl, presendingar, trossar, rigningar, fendarar, leytarar, vatnføt, akker og akkersketur, umframt aðrar búnaðarlutir, tó ikki fastir træ- ella metallutir, verður bert endurgoldin, um skaðin er orsakaður av:

1. Eldi v.m., sí grein 2.1.4.
2. At báturin er sokkin vegna skaðahending, sum annars verður goldin sambært tryggingartreytunum, hvølvdur, strandaður ella rent á grunn.
3. At báturin hevur rent á fastan ella flótandi lut, íroknað ís.
4. Stuldri frá forsvarliga læstum rúmi, herverki og ráni, sum ikki er framt av manning ella ferðafólki.
5. Sjóskaða, sí grein 2.1.3.

**2.1.9 Tryggingin fevnir ikki um**

2.1.9.1 Tryggingin veitir ikki endurgjald fyri skaða, sum er hendur av at báturin:

1. Var vanrøktur, ikki sjódyggur, ikki væl og virðiliga lastaður, ella neyðuga útgjørdur og -mannaður, hóast tryggjaði ikki var vitandi um hetta.
   1.1 At báturin er sjódyggur merkir:
      1. At skrokkur, maskinarí, mastur, rigningar og annar útbúnaður er í forsvarliga góðum standi.
      2. At báturin er nóg væl útgjørdur og mannaður til ferðina, soleiðis at tað til einhvørja tíð kann siglast og stýrast forsvarliga.
      3. At báturin undir vanligari sigling, og tá hann liggur við kaj, kann haldi seg á floti uttan hjálp. Báturin verður ikki mettur at verða sjódyggur, um hann søkkur orsakað av svíki í lensipumpu ella manglandi uppsýni.
2. Hevur verið nýttur til smugling ella onnur ólóglig endamál, hóast tryggjaði ikki var vitandi um hetta.
3. Hevur verið sleipaður uttan so, at sleipið var neyðugt orsakað av skaða.
4. Fær skaða undir flutningi, ið ikki er innanoyggja.

**2.1.10 Tryggingin fevnir heldur ikki um skaða, sum:**

1. Er gjørdur við vilja ella undir ávirkan av rúsdrekka, narkotika og euforiserandi evnum, hóast tryggjaði ikki var vitandi um hetta.
   1.1 Er skaðin gjørdur av grovum ósketni, kann rætturin til endurgjald eftir umstøðunum avmarkast ella fella burtur.
2. Er orsakaður av manglandi viðlíkahaldi, t.d. at báturin ikki regluliga er lensaður, ella at neyðugt eftirlit ikki hevur verið við sjálvvirkandi tólum o.l.
3. Bert viðvíkur tíðartapi, ferðaútreiðslum, hýru, kostpeningi ella bótum.
4. Stavar frá krígsvanda ella krígslíknandi hendingum, torpedo, minu ella líknandi, uppreistri, borgarakríggi, borgarligum uppreistri og ófriði og við ekspropriatión, tá lagt verður hald á ella hildið verður aftur ella líknandi fyriskipan frá føroyskum ella fremmandum, lógligum ella ólógligum myndugleika.
5. Beinleiðis ella óbeinleiðs er orsakaður av ella hevur samband við kjarnorku og geisling.
6. Er orsakaður av at báturin ikki hevur verið undir regluligum eftirliti ella umsjón av eigara ella øðrum, ið eigarin hevur biðið havt hetta eftirlit fyri seg.
7. Er orsakaður av at báturin ikki hevur verið forsvarliga festur í bryggju.
8. Er orsakaður av at tryggjaði hevur brotið ávísingar ella reglugerðir hjá myndugleikunum.
9. Er orsakaður av ávirkan av veðrinum, so sum rusti, teringi, frostspreinging, roti, svampi o.l.
10. Er orsakaður av sliti og elli.
11. Er orsakaður av at báturin verður nýttur til annað enn tað, hann er roknaður til.
12. Er orsakaður av at báturin hevur luttikið í kappsigling.
13. Er orsakaður av feili ella manglum, sum vóru til staðar, tá tryggingin varð teknað.

2.1.11 Endurgjald verður heldur ikki latið fyri skaða, ið kemst av vanligum brúki av bátinum, og tá talan bert er um kosmetiskan skaða, t.d. skøvur og merki á lakk og stafferingar, glóður frá fýrverki, sigarettum og øðrum, ella miss ella stuldur av brennievni.

2.1.12 Endurgjald verður heldur ikki latið fyri:

1. Upphangspútur á maskinu/geari.
2. Møguliga veiðu, vøru ella frakt og annað tap avleitt av missi av hesum.
3. Olju, proviant og aðrar lutir, ið eru ætlaðir at brúka umborð á bátinum.

**2.1.13 Grindaskaðar**

Hendir skaði á lutirnar í grein 2.1.1, 2.1.7 og 2.1.8, meðan báturin luttekur í grindadrápi, verður endurgjald bert veitt fyri tap, ið ikki verður endurrindað vísandi til Kunngerð um grind nr. 100 frá 5. juli 2013 við møguligum seinni broytingum.

2.1.13.1 Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at boð frá grindaformonnum og sýslumonnum í sambandi við drápið eru fylgd, og at skaðin verður fráboðaður grindaformanninum og sýslumanninum á staðnum beinanvegin, tá skaðin hendir.

**2.2 Skaðauppgerð og endurgjaldsupphædd fyri skrokktryggingina**

2.2.1 Fyri skrokkskaða er ásetta tryggingarupphæddin í tryggingarskjalinum hægsta endurgjald fyri hvørja skaðahending á skrokkin.

**2.2.2 Partvísir skrokkskaðar**

Partvísir skrokkskaðar verða gjørdir upp vísandi til grein 85 og 137–154, tó ikki grein 147 og 148, í Sjótryggingarsáttmálanum frá 2. apríl 1934.

2.2.2.1 Tryggingartakarin kann bert krevja endurgjald fyri partvísan skaða, um hesin verður umvældur og umvælingin er liðug.

2.2.2.2 Ein og hvør skaði sum kemur undir endurgjald, verður bert endurgoldin í tann mun skaðaupphæddin – roknað eftir galdandi reglum fyri tryggingina – er størri enn sjálvsábyrgdin tilskilað í tryggingarskjalinum

**2.2.3 Totalskaði**

2.2.3.1 Tryggjaði hevur rætt til endurgjald eins og fyri fult skipbrot, tá:

1. Báturin er heilt farin.
2. Báturin hevur verið fyri óhappi, sum verður endurgoldin sambært tryggingartreytunum, og tað verður hildið, at hann fyri rímiligan kostnað ikki kann bjargast.
3. Báturin er so skaddur, at tað ikki loysir seg at fara undir umvæling.
4. Trygd metir, at kostnaðurin til bjargingartiltøk í sambandi við kostnaðin til umvælingina av skaðanum uppá bátin verður størri enn tryggingarupphæddin - ella tryggingarvirðið, um hetta má haldast at vera lægri. Trygd hevur tá rætt til at veita endurgjald eins og fyri fult skipbrot, og loysa seg frá allari ábyrgd fyri kostnaði til og fylgjum av bjargingartiltøkum, sum tryggjaði ikki longu er skuldbundin av, tá sagt verður frá, at felagið vil nýta henda rætt.

2.2.3.2 Tryggingin fer úr gildi beinanvegin, tá fráboðan er givin um, at endurgjald verður veitt fyri skipbrot ella eins og fyri skipbrot.

2.2.3.3 Trygd veitir endurgjald fyri kostnað til forsvarliga umvæling av skaða, sum kemur undir tryggingina.

2.2.3.4 Endurgjald fyri máling og lakkering verður bert veitt til tilfar, sum hevur samband við skaðan. Ber ein umvæling við sær, at báturin minkar í virði, veitir Trygd ikki endurgjald fyri hetta. Kostnaður til fyribils umvæling verður ikki endurgoldin, uttan so at Trygd av hesi orsøk verður spart fyri útreiðslur, tá endalig umvæling er gjørd.

2.2.3.5 Tá endurgjald fyri ella eins og fyri fult skipbrot og bjargingarløn til triðjamann verður latið, verður eingin sjálvsábyrgd roknað.

2.2.3.6 Endurgjald fyri totalskaða verður gjørdir upp vísandi til grein 84 og 126–136 í Sjótryggingarsáttmálanum frá 2. apríl 1934.

2.2.3.7 Hevur tryggjaði rætt til endurgjald fyri skipbrot, kann hann krevja tryggingarupphæddina útgoldna.

**2.3 Ábyrgdartrygging**

2.3.1 Tryggingin fevnir um ta ábyrgd, ið verður áløgd tryggjaða í sambandi við nýtsluna av bátinum – bæði undir sigling og tá báturin er á landi.

**2.3.2 Hvat fevnir ábyrgdartryggingin ikki um?**

1. Skaða á lutir, sum tryggingartakarin ella brúkarin av bátinum eigur, ella sum hesir hava til láns, leigu, goymslu ella flutning, ella sum av aðrari orsøk er í teirra varðveitslu.
2. Persónskaða í sambandi við vatnskí-íðkan, og aðra líknandi íðkan, á tann persónin, ið íðkar.
3. Skaðar sum henda, tá báturin verður nýttur til ólóglig endamál, hóast tryggjaði ikki var vitandi um hetta.
4. Skaðar, sum eru gjørdir við vilja ella undir ávirkan av rúsdrekka, narkotika ella euforiserandi evnum.
5. Skaða, ið stavar frá krígsvanda ella krígslíknandi hendingum, torpedo, minu ella líknandi, uppreistri, borgarakríggi, borgarligum uppreistri og ófriði og við ognartøku, tá lagt verður hald á ella hildið verður aftur ella líknandi fyriskipan frá føroyskum ella fremmandum, lógligum ella ólógligum, myndugleika.
6. Skaða, sum beinleiðis ella óbeinleiðis er orsakaður av ella hevur samband við kjarnorku og geislingar.
7. Endurgjald, sum tryggjaði bert vegna verandi sáttmálaviðurskifti skal gjalda medinteressentum í bátinum ella til keypara av veiðuni.

2.3.3 Trygd hevur skyldu til at veita neyðturviliga trygd fyri, at sleppast kann undan lógarhaldi, sum er orsakað av endurgjaldábyrgd, sum kemur undir tryggingina.

**2.3.4 Endurgjaldsupphæddir fyri ábyrgdartryggingina**

2.3.4.1 Fyri mannskaða verður rindað endurgjald við upp til 10 mió. kr. fyri hvønn tryggingartilburð.

2.3.4.2 Fyri skaða á lutir og dýr verður rindað endurgjald við upp til 5 mió. kr. fyri hvønn tryggingartilburð.

2.3.4.3 Endurgjaldið verður uppgjørt vísandi til galdandi Endurgjaldsábyrgdarlóg.

2.3.4.4 Útreiðslur til avgerð av endurgjaldsspurningum verða goldnar, sjálvt um upphæddirnar av hesum fara upp um mestamarkið. Omanfyri nevnda skal verða í samráð við Trygd.

2.3.4.5 Sama er galdandi fyri sakarmálskostnað og rentur av endurgjaldsupphæddum, sum tryggingin fevnir um.

### 2.4 Hvussu verður endurgjald fyri skrokkskaðar latið?

2.4.1 Endurgjald kann verða latið sum umvælingarendurgjald ella kontant endurgjald.

### 2.4.2 Umvæling

2.4.2.1 Treytað av at talan er um skaða, sum er fevndur av tryggingini, veitir Trygd endurgjald fyri forsvarliga umvæling av skaðanum og rímiligar og neyðugar flutningsútreiðslur til nærmasta umvælara í Føroyum.

2.4.2.2 Trygd hevur rætt til at gera av, hvar skaðin skal sýnast og umvælast. Trygd kann ikki ábyrgdast fyri brek við arbeiðinum, sum umvælari hevur ábyrgdina av. Farast kann ikki undir umvæling uttan samtykki frá felagnum.

2.4.2.3 Endurgjald verður bert latið fyri fyribils umvæling, um hetta er neyðugt, og viðførir at endaliga umvælingin verður bíligari.

2.4.2.4 Verður umvælingin gjørd uttan fyri vanliga arbeiðstíð, rindar felagið ikki tær eykaútreiðslur, sum hetta hevur við sær.

2.4.2.5 Trygd rindar einans fyri umvæling av skaddu lutunum. Sum dømi kann nevnast, at felagið ikki endurrindar fyri litbrigdi aftaná lakering.

2.4.2.6 Um so er, at umvælingarkostnaðurin er hægri enn handilsvirðið á skadda lutinum, kann Trygd ístaðin lata eitt kontant endurgjald, sí grein 2.4.4.

2.4.2.7 Trygd hevur ikki ábyrgdina av, at eykalutir, sama slag sum teir skaddu, ikki kunnu útvegast.

2.4.2.8 Lækkar handilsvirðið á bátinum av umvælingini ella skaðanum, verður henda virðislækking ikki endurgoldin.

### 2.4.3 Nývirðisendurgjald

2.4.3.1 Leysamotorur, kalesjir, búnaðarlutir og persónligir ognarlutir verða endurgoldnir til nývirði, um skaðin hendir innan 1 ár, frá tí at lutirnir vóru keyptir nýggir.

2.4.3.2 Við nývirði er at skilja handilsvirðið á skadda lutinum sum nýggjur.

2.4.3.3 Fyri lutir eldri enn 1 ár kann rímiligur frádráttur verða gjørdur vegna aldur og brúk. Fyri persónligar ognarlutir verður frádráttur tó bert gjørdur, um gagnvirðið var munandi lækkað undan skaðanum.

2.4.3.4 Endurgjaldið kann ikki verða hægri enn handilsvirðið tann dagin, skaðin hendi.

2.4.3.5 Um so er, at umvælingarkostnaðurin er hægri enn handilsvirðið á skadda lutinum, kann Trygd ístaðin lata eitt kontant endurgjald, sí grein 2.4.4.

### 2.4.4 Kontant endurgjald

2.4.4.1 Verður endurgjald ikki brúkt til at umvæla tað skadda, kann tryggingartakarin velja at fáa kontant endurgjald útgoldið.

2.4.4.2 Verður skaðin endurgoldin kontant, verður endurgjaldið ásett til ta upphædd, sum ein bátur/lutur av sama merki, aldri og standi kundi fingist fyri móti gjaldi í hondina.

2.4.4.3 Tá kontant endurgjald verður veitt, verður, umframt frádrátt fyri virðisminking sum stendst av sliti og aldri, eisini drigið frá endurgjaldinum fyri minkað nýtsluvirði og aðrar umstøður.

2.4.4.4 Harafturat kann endurgjaldið ikki fara upp um handilsvirðið á skadda bátinum/lutinum, tann dagin skaðin hendi.

2.4.4.5 Tá talan er um stuldur, er tað ein treyt, at báturin ikki verður funnin aftur innan 4 vikur eftir, at felagið og løgreglan hava fingið fráboðan um stuldurin. Tað er ein treyt, at fráboðanin til felagið er skrivlig.

2.4.4.6 Hevur felagið goldið endurgjaldið kontant, er báturin/luturin ogn felagsins. Trygd hevur tó ikki skyldu at yvirtaka skaddar lutir.

2.4.4.7 Hevur felagið goldið endurgjaldið kontant, og báturin ikki verður afturgjørdur, verður tryggingin strikað.

2.4.4.7.1 Trygging kann teknast fyri bátin aftur, tá skaðin er umvældur, og báturin sýnaður av Trygd.

### 2.4.5 Endurgjald fyri radiotól og nautisk tól

2.4.5.1 Skaði á radiotól og nautisk tól, sí grein 2.1.1, verður endurgoldin við niðanfyri standandi frádráttum:

| Aldur | Frádráttur |
|---|---|
| 0–5 ár | 0% |
| 6–10 ár | 15% |
| 11–15 ár | 30% |
| 16–20 ár | 50% |
| eldri enn 20 ár | 100% |

### 2.4.6 Endurgjald fyri gear/drev á maskinu

2.4.6.1 Skaði á gear/drev á maskinu, sum verður endurgoldin sum skrokkskaði vísandi til grein 2.1.2 , verður endurgoldin við niðanfyri standandi frádráttum

| Aldur | Frádráttur |
|---|---|
| 0–3 ár | 0% |
| 4–8 ár | 30% |
| 9–15 ár | 50% |
| eldri enn 15 ár | 100% |

## 3. Felagsreglur

### 3.1 Tá trygging verður teknað

3.1.1 Tryggingartakarin hevur ábyrgdina av, at allar upplýsingar í tryggingarskjalinum eru rættar.

3.1.2 Skeivar upplýsingar kunnu hava við sær, at rætturin til endurgjald verður avmarkaður ella fellur burtur.

3.1.3 Tað er tryggingartakarans ábyrgd at halda tryggingarupphæddina viðlíka, soleiðis at tryggingarupphæddin til einhvørja tíð svarar til tryggingarvirðið á bátinum.

**3.2 Iðranarrættur**

3.2.1 Tú kanst angra keypið av hesi trygging.

3.2.2 Iðranarfreistin er 14 dagar. Freistin gongur frá tí degi, tú hevur fingið fráboðan um, at tryggingin er teknað. Freistin er tó í fyrsta lagi galdandi frá tí degi, tú á skrift hevur fingið upplýsing um iðranarrættin.

3.2.3 Gongur freistin út ein halgidag, leygardag, sunnudag, grundlógardag, jólaaftan ella nýggjársdag, verður freistin longd til næsta gerandisdag.

3.2.4 Um tú ynskir at angra keypið av tryggingin, skalt tú boða Trygd skrivliga frá hesum, áðrenn freistin gongur út.

**3.3 Tryggingarskeið, uppsøgn og broyting**

3.3.1 Tryggingin er galdandi til hon skrivliga verður søgd upp av tryggingartakaranum ella felagnum við í minsta lagi 1 mánaða varningi, til tann fyrsta í mánaðinum.

3.3.2 Aftan á hvønn skaða hava bæði tryggingartakarin og felagið rætt til, í upp til 1 mánað eftir, at skaðin er gjørdur upp, at siga upp tryggingina við 14 daga varningi.

3.3.3 Harafturat kann felagið í upp til 1 mánað eftir, at skaðin er gjørdur upp, sum treyt fyri framhaldandi trygging, herða tryggingartreytirnar, sum t.d. hækka sjálvsábyrgdina ella umskipa gjaldið í serstaka gjaldsskrá í eitt ávíst tíðarskeið.

**3.4 Rindan av tryggingargjaldi**

3.4.1 Fyrsta tryggingargjaldið og uppkravsgjald fella til gjaldingar samstundis, sum tryggingin kemur í gildi, og seinni tryggingargjøld og uppkravsgjøld teir gjalddagar, sum ásettir eru í tryggingarskjalinum.

3.4.2 Gjaldskrøv verða send á ta adressu, ið tryggingartakarin hevur tilskilað.

3.4.3 Verður tryggingargjaldið ikki goldið aftaná fyrsta krav, sendir Trygd nýggja skrivliga gjaldsáminning til ta adressu, tryggingartakarin hevur tilskilað, og tryggingartakarin verður skuldskrivaður fyri áminningargjald.

3.4.4 Í áminningarskrivinum verður tilskilað, hvør rættarfylgjan er, verður tryggingargjaldið ikki goldið innan ta í skrivinum ásettu freistina.

3.4.5 Tílík áminning verður ikki send, fyrrenn 14 dagar eru farnir, síðani gjaldsfreistin fyri fyrsta uppkrav er farin. Verður ikki goldið innan 14 dagar eftir áminningina, eru felagsins skyldur falnar burtur.

**3.5 Prístalsviðgerð**

3.5.1 Tryggingargjaldið verður javnað sambært brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya einaferð um árið. Grundarlagið er prosentvøksturin av brúkaraprístalinum fram til 3. ársfjórðing samanborið við sama tíðarskeið árið fyri. Broytingin fær virknað til høvuðsforfall á tryggingini. Er prosentvøksturin minni enn 1%, verður gjaldið tó javnað við 1%. Verða ongi nýtilig almenn brúkaraprístøl kunngjørd, hevur Trygd rætt til at javna við øðrum grundarlagi.

**3.6 Flyting, navna- og váðabroyting**

3.6.1 Skjótast tilber skal skrivlig fráboðan sendast felagnum:

1. Tá tryggingartakarin ella tann fasti brúkarin skifta bústað ella navn.
2. Tá váðin, sum nevndur er í tryggingarskjalinum, verður broyttur, eitt nú við at broytingar eru á bátinum, t.d. broyting av konstruktión, installatión av motori o.l., at tryggingartakarin fær sær annan bát í staðin fyri tann, ið er tryggjaður sambært tryggingarskjalinum, siglingarleiðin broytist í mun til tað, ið stendur á tryggingarskjalinum o.s.fr.

3.6.2 Trygd tekur síðani støðu til, um og undir hvørjum treytum, tryggingin kann halda áfram.

3.6.3 Váðabroyting kann hava við sær broyting í tryggingargjaldinum, roknað frá tí at váðin er øktur, ella uppsøgn av tryggingini.

3.6.4 Verður váðabroyting ikki fráboðað, kann hetta hava við sær, at rætturin til endurgjald heilt ella fyri ein part fellur burtur.

**3.7 Sjálvsábyrgd**

3.7.1 Sjálvsábyrgd er tann parturin av skaðanum, ið tú sjálvur skal gjalda.

3.7.2 Valda sjálvsábyrgdin stendur á tryggingarskjalinum. Upphæddirnar verða ikki prístalsjavnaðar.

3.7.3 Fyri tryggingina fyri persónligar ognarlutir, sí grein 5.2, er ein serlig sjálvsábyrgd galdandi.

3.7.4 Eingin sjálvsábyrgd verður tó roknað, tá endurgjald verður latið fyri, ella eins og fyri, fult skipbrot og bjargingarløn til triðjamann.

**3.8 Trygging sambært øðrum tryggingarskjali (dupulttrygging)**

3.8.1 Er trygging fyri somu lutir og sama váða tryggjað í øðrum tryggingarfelagi, skal skaðin fráboðast bæði Trygd og viðkomandi felagi. Samstundis skal Trygd hava fráboðan um dupulttryggingina.

3.8.2 Er fyrivarni tikið í tryggingarskjalinum hjá hinum tryggingarfelagnum um, at tryggingin fellur burtur ella lækkar, um trygging er teknað sambært øðrum tryggingarskjali, er sama fyrivarni galdandi í hesi tryggingini, og tryggingarfeløgini rinda tá, vísandi til Sjótryggingarsáttmálan grein 15–18, lutfalsligt endurgjald.

3.8.3 Er skaddi luturin umfataður av ábyrgdartrygd frá sølumanni, tænastuveiting ella líknandi, hevur tryggjaði skyldu at venda sær til ábyrgdarstillara fyri at fáa endurgjald. Trygd veitir bert endurgjald sambært tryggingartreytunum, um tryggjaði ikki fær fullan dekning frá ábyrgdarstillara.

3.8.4 Hevur Trygd veitt endurgjald vísandi til tryggingartreytirnar, gongur Trygd inn í rættindini hjá tryggjaða mótvegis øðrum, ið kunnu ábyrgdast fyri skaðan.

**3.9 Eftirlit við bátinum**

3.9.1 Bátar skulu altíð verður undir forsvarligum eftirliti, og fortoyingarútgerð í forsvarligum standi.

3.9.2 Trygd hevur til eina og hvørja tíð rætt til at lata bátin kanna við atliti at meta um bátin og váðaviðurskiftini.

3.9.3 Vísir eftirlitið, at báturin ikki er tryggingarbarur, ella serliga útsettur fyri ávísum skaðaorsøkum, kann Trygd gera sertreytir galdandi fyri tryggingina, strika tryggingina ella partar av henni, og geva veðhavaranum boð um hetta við 14 daga ávaring.

3.9.4 Um tryggjaði noktar Trygd at gera nevnda eftirlit, hevur felagið rætt til at strika tryggingina og geva veðhavarunum boð um hetta við 14 daga ávaring.

**3.10 Bjarging og varðveitsla**

3.10.1 Tryggjaði skal, tá ið skaði er hendur ella er um at taka seg upp, eftir førimuni fyribyrgja ella avmarka skaðan.

3.10.2 Trygd letur í hesum sambandi rímiligt endurgjald fyri at seta í verk hetta arbeiðið. Endurgjaldið verður latið út um tryggingarupphæddina.

3.10.3 Tryggingin fevnir somuleiðis um skaða á tryggjaðar lutir í samband við forsvarlig bjargingartiltøk at forða bráðhóttandi skaða á fólk ella lutir, ið onnur eiga.

**3.11 Burturbeining av skaddum lutum**

3.11.1 Umvæling má ikki verða gjørd, ella skaddir lutir burturbeindir, uttan góðkenning frá Trygd.

3.11.2 Eru lutirnir burturbeindir ella umvæling gjørd, uttan góðkenning frá Trygd, er hetta fyri egna rokning.

**3.12 Viðlíkahald o.a.**

3.12.1 Bátar skulu viðlíkahaldast.

3.12.2 Um ein skaði fyri tað mesta er orsakaður av vantandi viðlíkahaldi, kann Trygd nokta at veita endurgjald fyri skaðan.

3.12.3 Sama ger seg galdandi, um skaðin m.a. er orsakaður av skeivleikum viðvíkjandi konstruktión, uppsetan ella broti á galdandi lógir og reglugerðir.

3.12.4 Metir Trygd, at tryggjaðu lutirnir eru í ov vánaligum standi, ella at galdandi lógir og fyriskipanir ikki eru fylgdar, kann Trygd strika tryggingina ella partar av henni.

**3.13 Skaði elvdur við vilja v.m.**

3.13.1 **Við vilja**

Hevur tryggjaði elvt til skaðan við vilja, hevur hann onki krav móti felagnum.

3.13.2 **Við grovum ósketni**

Hevur tryggjaði elvt til skaðan av grovum ósketni, kann hann, eftir umstøðunum missa rættin til endurgjald.

3.13.3 **Undir ávirkan av rúsandi løgi ella evni**

Hevur tryggjaði elvt til skaðan undir ávirkan av rúsandi løgi ella evni hevur hann onki krav móti felagnum.

3.13.4 **Tá tryggjaði er undir 14 ár**

Grein 3.13.1 og 3.13.2 eru ikki galdandi, um tryggjaði var undir 14 ár ella orsakað av sinnissjúku, menningartarni, ikki varandi ørskapi ella øðrum líknandi umstøðum ikki hevur verið førur fyri at fara fram við skili.

**3.14 Trygdarásetingar**

3.14.1 Eru forboð og/ella krøv í tryggingarskjalinum ella -treytunum, sum skulu verða hildin ella lokin, til tess at fyribyrgja ella minka um skaða, og hevur tryggjaði ella onnur, ið hava skyldu at ansa eftir, at hesi krøv verða fylgd, ikki syrgt fyri hesum, hevur tryggjaði bert krav móti Trygd, um og tá tryggingartakarin prógvar, at skaðin ikki hendi ella gjørdist størri av, at hesi forboð og/ella krøv ikki vórðu hildin ella lokin.

**3.15 Kærumøguleikar**

3.15.1 Er ósemja millum teg og Trygd um tryggingarviðuskifti, ella ert tú t.d. ónøgdur við avgerð, ið er tikin í sambandi við skaða, kanst tú, eftir at hava roynt semju við viðkomandi deild, venda tær til kæruviðgera okkara. Sí fleiri upplýsingar á heimasíðu okkara, **www.trygd.fo**

3.15.2 Tú hevur eisini møguleika at senda skrivliga kæru til kærunevndina fyri trygging:

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaards Gade 2,1
1572 København V

Tlf. +45 33 15 89 00
Fax +45 33 15 89 10

Telefontíð kl. 10.00–13.00 (donsk tíð)
Heimasíða: **www.ankeforsikring.dk**

3.15.3 Serligt oyðublað til kæruna fæst á heimasíðu okkara: **www.trygd.fo** ella á **www.ankeforsikring.dk**

3.15.4 Eitt ávíst kærugjald skal gjaldast, tá kært verður. Kærugjaldið sæst á heimasíðuni hjá kærunevndini, www.ankeforsikring.dk. Gjaldið verður endurgoldið, um tú fært fult ella lutvíst viðhald í kæruni.

**3.16 Rættargongd**

3.16.1 Bæði Trygd og tryggjaði taka við rættargongd í Føroyum.

## 4. Skaðafráboðan o.l.

**4.1 Tá ið skaði hendir**

4.1.1 Hendir skaði hevur tryggingartakarin skyldu til, eftir førimuni at fyribyrgja ella avmarka skaðan, eins og Trygd hevur rætt at seta tiltøk í verk við sama endamáli.

4.1.2 Hendur skaði, skal skaðin, um tryggingartakarin ikki skal missa rættin til skaðabót, verða fráboðaður til Trygd skrivliga innan 6 mánaðir eftir, at tryggingartakarin fekk ella átti at havt fingið kunnleika um skaðan.

**4.2 Skaðafráboðan**

4.2.1 Hendir skaði, skal Trygd hava fráboðan skjótast gjørligt.

4.2.2 Ringið á telefon 35 81 00 ella farið inn á **www.trygd.fo** og fráboðið skaðan.

**4.2.3 Skaðatænastan**

Eftir kl. 16 gerandisdagar, tó hósdag eftir kl. 17.00, og í vikuskiftunum ber til at ringja til Skaðatænastuna á telefon 32 13 12.

4.2.4 Stuldurs- og herverksskaðar skulu harumframt vera fráboðaðir løgregluni, og kvittan fyri hesi fráboðan send Trygd.

**4.3 Umvæling**

4.3.1 Skaði verður umvældur í samráð við Trygd. Tó kann fyribils umvæling verða gjørd sambært avtalu við Trygd, um tað er neyðugt til tess at fyribyrgja álvarsligum fylgjum. Í aðrar mátar er ikki loyvt at burturbeina ella umvæla tryggjaðar lutir, fyrr enn Trygd hevur givið sítt samtykki. Er ikki biðið um samtykki frá Trygd, fellur endurgjaldsskylda felagsins burtur.

**4.4 Ábyrgdarskaðar**

4.4.1 Tá ræður um ábyrgdarskaða, skal fráboðan sendast Trygd beinanvegin endurgjaldskrav verður sett fram, ella roknast kann við tí. Endurgjaldsskylda og stødd á endurgjaldskravi má ikki verða góðkend uttan samtykki felagsins. Er hetta gjørt, kann tað fáa avleiðingar fyri møguligt endurgjald frá Trygd.

**4.5 Skjalprógv**

4.5.1 Tá skaði er hendir, kann Trygd krevja, at tryggingartakarin skjalprógvar ella ger sannlíkt krav sítt móti felagnum.

4.5.2 Tryggingartakarin eigur tí at goyma kvittanir fyri nýggjar og dýrar lutir.

4.5.3 Fyri serliga virðismiklar lutir, eiga myndir at verða tiknar, og myndir og kvittanir at verða goymdar.

4.5.4 Kann tryggingartakarin ikki skjalprógva ella gera sannlíkt krav sítt móti felagnum, kann hetta ávirka endurgjaldið.

## 5. Serstakar tryggingar

**5.1 Sálarlig kreppuhjálp**

5.1.1 Treytað av læknaváttan, veitir Trygd fíggjarliga hjálp til sálarliga kreppuhjálp til tey tryggjaðu, um ein av niðanfyri nevndu støðum hevur útloyst eina bráðfeingis sálarliga kreppu:

1. Báturin er sokkin.
2. Tilburðir, ið hava samband við brúk av bátinum, hava kravt mannalív.
3. Skaði er hendur á bátin, ið er umfataður av tryggingini, og hóttandi vandi hevur verið fyri mannalívi.
4. Tryggjaði doyr orsakað av tilburði, ið er umfataður av hesi trygging.
   a. Rætt til sálarliga kreppuhjálp hava: Foreldur, systkin, hjúnarfelagi/samlivari og børn.

5.1.2 Endurgjald verður veitt fyri upp til 10 viðtalur hjá sálarfrøðingi fyri hvønn tryggjaðan pr. skaðahending.

5.1.3 Endurgjald er treytað av, at Trygd hevur móttikið krav um endurgjald í seinasta lagi 3 mánaðir eftir skaðahendingina.

5.1.4 Endurgjald verður bert veitt fyri útreiðslur, ið tryggjaði ikki kann fáa endurrindaðar frá aðrari síðu.

**5.2 Persónligir ognarlutir**

5.2.1 Henda trygging fevnir um alt vanligt leyst privat innbúgv, ið tryggingartakarin fast hevur liggjandi í bátinum.

**5.2.2 Tryggingin fevnir ikki um:**

- Gull, silvur, platin, perlur, gimsteinar og aðrar prýðislutir.
- Pengar, virðisbrøv, mynt- og frímerkjasamlingar.
- Forngripir, málningar, listaverk, ektað teppi, pelsar, vín og spiritus.
- Súkklur, sjófør og motordrivin før ella lutir av slíkum.

**5.2.3 Tryggingarupphædd**

5.2.3.1 Endurgjald verður latið upp til 20.000,00 kr. fyri hvørja skaðahending. Upphæddin verður ikki prístalsjavnað.

5.2.4 Tryggingin veitir endurgjald fyri skaða á innbúgv, sum er ein beinleiðis fylgja av:

1. Sjóskaða, sí grein 2.1.3.
2. Eldi, spreinging og toruniðurslættri, sí grein 2.1.4.
3. Stuldri, herverki og ráni, sí grein 2.1.5.

5.2.5 Ein sjálvsábyrgd á 10%, ella í minsta lagi kr. 500,00, er galdandi fyri allar skaðar á innbúgv. Upphæddin verður ikki prístalsjavnað.

## 6. Ískoytistryggingar

*Er bert umfatað av tryggingini, um tað er tilskilað í tryggingarskjalinum.*

**6.1 Snellur**

6.11 Snellur umborð á bátinum eru tryggjaðar móti somu vandum, sum skrokktryggingin á bátinum.

6.12 Tryggingarupphæddin ásett í tryggingarskjalinum er hægsta endurgjald fyri hvørja skaðahending á snellur.

6.13 Trygging kann ikki teknast fyri el-snellur eldri enn 20 ár.

6.14 Sjálvsábyrgdin fyri skaða á snellur er kr. 2.500,00. Upphæddin verður ikki prístalsjavnað.

**6.2 Maskintrygging**

6.2.1 Endurgjald verður latið fyri skaða á maskinu, leysamotorar, uttanborðadrev, gear, kobling, ljósmotorar og generatorar yngri enn 20 ár.

6.2.1.1 Upphangspútur á maskinu/geari eru ikki umfataðar av maskintryggingini.

6.2.2 Tryggingin veitir endurgjald fyri ein og hvønn skaða, ið ikki er undantikin sambært grein 6.2.3.

**6.2.3 Undantøk**

6.2.3.1 Tryggingin fevnir ikki um skaðar, ið eru orsakaðir av:

1. Sliti, overving, elli og teringi.
2. Væntandi eftilitssýni.
3. Væntandi røkt og beinleiðis og óbeinleiðis skeivari viðferð av maskinrúminnsetingini.
4. Feili í uppbygging ella tilfari.
5. At lutirnir ikki eru ísettir sambært vegleiðing/leiðbeining hjá framleiðara.
6. At brekið kann skjótast inn undir galdandi garantitreytir.

6.2.3.2 Harumframt fevnir tryggingin ikki um útskifting av olju, køliløgi, pakningum, pakkdósum, stempulringum, reimum, legum ella líknandi slitdeilum, umframt ein og hvønn kosmetiskan skaða.

6.2.3.3 Tryggingin fevnir heldur ikki um skaðar á maskinuna, ið eru undantiknir undir skrokktryggingini (grein 2.1) á bátinum.

6.2.4 Í einum og hvørjum skaða skal eigarin prógva, at skaðin er umfataður av maskintryggingini.

6.2.5 Verður endurgjald latið fyri maskinskaðan sambært ásetingunum í tryggingartreytunum grein 2.1.7, verður maskintryggingin ikki nýtt.

6.2.6 Kunnu eykalutir av sama slag sum skaddu lutirnir ikki fáast til vega, ella kunnu teir bert fáast til vega fyri órímiliga høgan kostnað, fevnir tryggingin ikki um henda eyka kostnaðin. Endurgjald verður ásett eftir, hvat tað vanliga hevði kostað at skift skaddu lutirnar.

6.2.7 Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at skaddu lutirnir eru viðlíkahildnir sambært vegleiðing/leiðbeining frá framleiðara.

**6.2.8 Aldursfrádráttur**

6.2.8.1 Skaði á maskinu v.m., sí grein 6.2, verður endurgoldin við niðanfyri standandi frádráttum:

| Aldur | Frádráttur |
|---|---|
| 0–5 ár | 0% |
| 6–10 ár | 15% |
| 11–15 ár | 30% |
| 16–20 ár | 50% |
| eldri enn 20 ár | 100% |

6.2.8.2 Umframt aldursfrádrátt sambært grein 6.2.8.1, verður endurgjaldið ásett sambært grein 2.4.

**P/F Trygd**
**Tryggingarfelag**

Oknarvegur 5
P.O. Box 44
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 358 100
Fax +298 317 211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

Trygd hugsar um teg

SENDISTOVAN